# Flutningsstuðulin til fisk tann sami í ár

**Lønjavningarstovan hevur í ár avgreitt kr. 2.5 mió. kr í flutningstuðli. Málið er, at útgjaldingarnar av flutningstuðli í 2001 verða innan fyri tær 3 mill. kr., sum játtanin væntandi verður, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Ólavur í Beiti*

Jørgen Niclasen fer nú at skjóta upp, at flutningsstudningarnir verða settir í gildi óbroyttir fyri 2001 soleiðis, at heimild verður fyri at rinda stuðul til flutning av feskum virkaðum fiski frá fiskavirkjum til avskipingarhavn, har fírðir ella sund skilja og til flutning av frystum fiski og skeljadjórum frá frystigoymslum til framleiðsluvirki, har fírðir ella sund skilja.

Í viðmerkingunum til uppskotið, verður upplýst, at Lønjavningarstovan hevur í ár avgreitt uml. 2.5 mió. kr. í flutningsstuðli. Gjaldstovan hevur bókað 2.6 mió. kr. á fíggjarárið 2000. Hesi tøl benda á, metir Jørgen Niclasen, at samlaði kostnaðurin av flutningstuðli fyri 2000 verður oman fyri 3 mill. kr. og í ringasta fall kanska rundar 3,5 mill. kr.

**10 oyru**

Fram til 29. mai 2000 vórðu latin upp til 10 oyru/kilo til flutning fiski frá útróðrarbátum frá økjum, har eingin uppboðssøla er, til nærmastu uppboðssølu, meðan stuðulin til flutning av fiski frá uppboðssølu ella landingarmiðstøð til virkingar í økjum, har fírðir ella sund skilja, var upp til 31 oyru/kilo.

Men við kunngerð sum fekk gildi 30. mai 2000, vórðu stuðulsupphæddirnar broyttar soleiðis, at stuðulin til flutning av útróðrarfiski er 10 oyru/kilo, meðan hinir studningarnir eru minkaðir til ávikavist 25 oyru/kilo og 15 oyru/kilo ásett eftir flutningsleið.

Jørgen Niclasen sigur í viðmerkingunum, at stuðulin, sum varð minkaður seinast í mai mánaða, hevur minkað um útgjaldingarnar av stuðli og kanska eisini nøgdirnar av fiski, sum verða fluttar. Málið er, at útgjaldingarnar av flutningstuðli í 2001 verða innan fyri tær 3 mill. kr., sum játtanin væntandi verður.

**Flutningstuðul útgoldin í 2000 býtt á mánaðir**

| Mánaði | Kilo | Flutn. stuðul | stuðul/kilo |
|---|---|---|---|
| rest 99 | 857.909 | 141.126 | 0,16 |
| januar 2000 | 1.218.157 | 295.468 | 0,24 |
| februar 2000 | 1.659.747 | 458.644 | 0,28 |
| mars 2000 | 1.499.245 | 404.778 | 0,27 |
| apríl 2000 | 880.129 | 236.274 | 0,27 |
| mai 2000 | 1.659.203 | 441.726 | 0,27 |
| juni 2000 | 885.410 | 159.748 | 0,18 |
| juli 2000 | 678.916 | 125.193 | 0,18 |
| august 2000 | 796.013 | 144.851 | 0,18 |
| september 2000 | 686.394 | 108.013 | 0,16 |
| oktober 2000 | 26.723 | 4.468 | 0,17 |
| | **10.847.846** | **2.520.287** | **0,23** |



*Savnsmynd*

# Eingi føroysk hagtøl

**Tað er tó greitt, at fleiri og fleiri føroysk virkir seta verkætlanir í gongd sjálvi ella eru við í verkætlanum, har tey eisini taka fíggjarliga ábyrgd, skrivar Vinnuhúsið**

fíggjarætlanir líka stórar sum samlaða føroyska játtanin av granskingarpeningi. Tað hevði verið hóskandi at samanborið føroyska innsatsin á hesum økinum við innsatsin hjá smáum og miðalstórum virkjunum í hesum londum.

Parturin hjá vinnuni í samlaðu granskingarupphæddini var í 1995 eitt nú í Íslandi 35%, 47% í Danmark og 66% í Svøríki. Somuleiðis varð mett at gransking/menning, sum vinnan tekur virknan lut í, í Føroyum, er sera avmarkaður, skrivar Vinnuhúsið.

Og víðari verður sagt, at hetta er partvíst rætt, men sera torført at staðfesta, tí tað eru eingi føroysk hagtøl, sum vísa hvat føroysk vinna nýtir av peningi til gransking og menning. Tað er tó greitt, at fleiri og fleiri føroysk virkir seta verkætlanir í gongd sjálvi ella eru við í verkætlanum har tey eisini taka fíggjarliga ábyrgd. Tað skal tó ásannast, at føroysk vinna og tey granskingarumhvørvir, sum eru í Føroyum, onkusvegna ikki finna hvønn annan, og brúka tí ikki teir førleikar, sum eru ávíkavist í vinnuni og í granskingarumhvørvunum.

Hvat viðvíkur teimum granskingarupphæddum, sum vinnan í grannalondum okkara tekur lut í gransking við, so er tað soleiðis, at har eru fleiri stórar altjóða fyritøkur, sum hava granskingardeildir á egnum virkið, sum hava

**Samanumtikið**

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu verður týdningurin av gransking og menning innan KT og biotøkni undirstrikaður. Somuleiðis hevur tað ferð aftaná ferð verið frammi, at tað hevur sera stóran týdning fyri ein sjálvberandi føroyskan búskap, at gransking og menning verður raðfest frammarlaga, soleiðis at føroyskari vinnu verður tryggjað eitt framhaldandi gott kappingarføri.

Endurskoðan av lógini um Granskingarráð Føroya er eitt stig á leiðini og tann komandi Granskingargrunnurin fer væntandi at verða við til at skapa fyritreytir fyri, at føroykst granskingarumhvørvi verður stimbrað og ment, vinnuni og samfelagnum at gagni.

Tað hevur tó týdning at undirstrika, at eitt ávíst arbeiði má gerast fyri at knýta vinnuna og granskingarumhvørvini saman, soleiðis at hesi fáa gagn hvør av øðrum. Hetta er ikki nakað, sum kemur í lag uttan víðari, men krevur at granskingarumhvørvini vísa á, hvar tey hava tørv á vinnuni og øvugt, skrivar Vinnuhúsið.

# Lógin um Granskingarráð Føroya endurskoðast

**Nú hevur Mentamálastýrið gjørt uppskot til lóg um Granskingargrunn Føroya, sum skal koma í staðin fyri Granskingarráðið**

Granskingarráð Føroya hevur virkað sum eitt sjálvstøðugt ráð undir Mentamálastýrinum, sum m.a. hevur havt til uppgávur at ráðgeva landsstýrið og løgtingið í granskingarpolitiskum spurningum. Somuleiðis við at fylgja við menningini innan føroyska og millumtjóða gransking, ráðgeva í spurningum um, hvussu granskingin kann gerast gagnlig fyri samfelagið bæði á almenna og privata økinum - viðgera umsóknir um granskingarstuðul og geva landsstýrinum tilmæli um, hvørjum granskingarstuðul eigur at verða latin, av tí peningi, ið settur er av til endamálið á fíggjarlógini, skrivar Vinnuhúsið.

**Mennandi umhvørvi**

Higartil hevur ikki eydnast at fingið gongd á gransking, har vinnan hevur ein virknan lut í granskingini. Hetta er m. a. orsakað av, at neyðugir karmar ikki hava verið til staðar. Samanumtikið kann sigast, at Granskingarráð Føroya ikki hevur fingið ta undirtøku, sum annars var ætlað.

Á hoyringsfundi í Mentamálastýrinum fyri tveimum vikum síðani var lógaruppskotið um stovnsetan av einum granskingargrunni til viðgerðar. Ætlanin hjá Mentamálastýrinum er, at Granskingargrunnurin skal koma í staðin fyri Granskingarráð Føroya. Ætlanin er at skapa fyritreytirnar fyri einum mennandi granskingarumhvørvi í Føroyum, har karmarnir eru soleiðis at trívnaður verður skaptur millum granskarar. Hetta skal gerast við at tryggja at: peningur verður játtaður játtanin er trygg fakligt umhvørvið er tilstaðar

Ætlanin er at hækka játtanina til granskingarætlanir soleiðis, at neyðugur peningur verður tøkur at fremja tær ætlanir, sum kunnu verða við til, at gongd kemur á granskingina í Føroyum, bæði tá talan er um grundgransking og endamálsgransking. Við at seta á stovn ein granskingargrunn er ætlanin, at ein peningur verður so mikið tryggur, at verkætlanir, sum fara í gongd, kunnu fremjast í verki, og at føroyskir granskarar, sum arbeiða uttanlands, kunnu koma heim til Føroya at granska og fáa neyðugar tryggar karmar at virka undir.

Samstundis er endamálið hjá Granskingargrunninum so mikið breitt, at tað verður møguligt at byggja upp karmar og fysisku umstøðurnar soleiðis, at gransking kann verða framd. Hesir faktorarnir skulu viðvirka til, at tað sum frálíður verður uppbygt eitt fakligt umhvørvi, sum er neyðugt, skal granskingin mennast, og granskarar trívast her á landi.

Granskingargrunnurin skal hava eitt stýrið manna við umboðum fyri Fiskimálastýrið, Almanna- og heilsustýrið, Vinnumálastýrið og Mentamálastýrið, 2 vinnuumboðum og formanni, sum skal útnevnast av Mentamálastýrinum.

**Alt ov lágt**

Ætlanin er eisini, at granskingargrunnurin skal hava eina játtan, sum er umleið 1/3 av tí samlaðu upphæddini, sum verður nýtt til gransking í Føroyum. Hetta merkir, at játtanin frá Mentamálastýrinum í granskingargrunnin á hvørjum árið verður tengd at, hvat hini aðalstýrini seta av til gransking á sínum øki. Fíggjarliga játtanarstøðið til gransking í Føroyum er sum er alt ov lágt, og skal verulig gongd fáast á endamálsgransking, serliga vinnugransking, verður mett, at neyðugt er at útvega meira pening til endamálið.

Samlaða játtanin til gransking í Føroyum er væl lægri enn í teimum londum vit vanliga samanbera okkum við ella 0,6% av BTÚ í mun til grannalond okkara Ísland, Noreg, Svøríki, Finnland og Danmark, sum ávikavist brúktu 1,54%, 1,72%, 3,59%, 2,37% og 1,92% av BTÚ til gransking í 1995, skrivar Vinnuhúsið.



# Nú sleppur nýggi trolarin til fiskiskap

**Eftir at hava liva í óvissuni í meiri enn eina viku, kann Gudmund Mortensen á Tvøroyri nú róliga lata nýggja trolaran hjá sær fara til fiskiskap**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað er onki er til hindurs fyri at nýggi tvøratrolarin, Rasmus Effersøe, fær fiskiloyvi undir Føroyum.

Hetta er niðurstøðan hjá lógfrøðinginum hjá Fiskimálastýrinum.

Sostatt kann Gudmund Mortensen ekkaleysur senda nýggja Rasmus Effersøe til fiskiskap.

Tað var herfyri, at Gudmund Mortensen á Tvøroyri keypti trolaran "Haukur" úr Íslandi.

Ætlanin var, at hann skuldi koma í flotan ístaðin fyri gamla Rasmus Effersøe, sum sostatt verður lagdur. Nýggi Rasmus skuldi samstundis ivirtaka fiskirættindini hjá gamla Rasmus og tað hevði reiðarin fingið tilsøgn um frá Fiskimálastýrinum.

Men tá ið trolarin væl og virðiliga var komin til landið, varð ivi brádliga sáddur um fiskiloyvið hjá skipinum.

Haukur er nevniliga gamli toftatrolarin Snoddið og hann fekk upphøggingarstuðul, tá ið hann fyrst í nítiárunum varð seldur til Íslands.

Og eftir lógini um upphøggingarstuðul kann skip, sum hevur fingið stuðul, ongantíð fáa fiskiloyvi undir Føroyum aftur.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, segði herfyri við Sosialin, at tað stóð ongastaðni viðmerkt í skjølunum yvir skipið, at tað hevði fingið upphøggingarstuðul. Tað stóð heldur ikki í sjálvum skipsblaðnum, ið er sama skjalið fyri skip, sum tinglýsingarskjalið er fyri aðra ogn. Tað er annars vanligt, at slíkt stendur í skipsblaðnum.

– Men tá ið vit so komu eftir, at trolarin hevði fingið upphøggingarstuðul, var tað neyðugt at steðga málsviðgerðini, áðrenn hann fekk endaligt fiskiloyvi, og at kanna málið til botns fyri at beina allan iva av vegnum, segði Jørgen Niclasen.

Hann bað tí um eina lógfrøðiliga meting av málinum.

**Ongin forðing**

Tann lógfrøðiliga metingin er nú liðug. Og niðurstøðan hjá lógfrøðinginum er, at tað er onki til hindurs fyri, at nýggi Rasmus Effersøe fær fiskiloyvi undir Føroyum.

Tá ið lógin um upphøgging varð gjørd í 1990, vóru allar lógir skrivaðar bæði á føroyskum og á donskum.

Jørgen Niclasen vísir á, at lógfrøðingurin sigur, at tað er misvísandi, tá ið lógin brúkar orðið "upphøgging", tí hon krevur nevniliga ikki, at skipið verður høgt upp, ella burturbeint.

– Á donskum eitur tað "ophørsstøtte" og ikki "ophugningsstøtte".

Lógin sigur, at endamálið við stuðlinum, var at minka um fiskiorkuna. Men tann, sum fekk stuðulin, kundi framvegis eiga skipið og brúka tað til annað endamál.

– Tað merkir, at endamálið við upphøggingarstuðlinum var fyrst og fremst at fáa veiðiloyvi ni frá skipum og bátum.

– Í føroyska tekstinum stendur, at skip, sum fær upphøggingarstuðul, missur veiðiloyvi og kann ikki fáa tað aftur.

Løgfrøðingurin sigur, at við eini beinleiðis tulking, er tað hetta ávísa loyvið hjá fiskifarinum, sum fær upphøggingarstuðul, ið ikki kann fáast aftur.

– Men við hesum verður ikki sagt, at skipið, ikki kann fáa annað, ella nýtt veiðiloyvi.

Sostatt er lógfrøðingurin hjá Fiskimálastýrinum komin til ta niðurstøðu at tað er onki til hindurs fyri, at eitt skip, sum hevur fingið upphøggingarstuðul, kemur aftur í flotan, um tað fær fiskiloyvi hjá einum øðrum skipi.

– Tað er nevniliga ikki veiðiloyvi, sum skipið, ið fekk upphøggingarstupul, hevði. Í hesum føri er tað heldur ikki talan um eitt nýtt veiðiloyvi, men einans um at føra loyvið hjá einum báti, sum verður lagdur, yvir á eitt annað skip.

Jørgen Niclasen sigur, at sostatt er onki til hindurs fyri, at Rasmus Effersøe fær fiskiloyvi undir Føroyum, og tað verður nú avgreitt.

Gamli Rasmus Effersøe fór ein tú í farnu viku og ætlanin var, at hann skuldi leggjast, tá ið hann kemur inn aftur. Og tað fer nýggi Rasmus avstað.

Annars vísir lógfrøðingurin á, at í lógini um upphøggingarstuðul, er í ávísum føri ósamsvar ímillum føroyska og danska tekstin.

– Í danska tekstinum stendur, at "fiskefartøjer, som har fået ophørsstøtte, mister fiskerilicensen og kan ikke opnå ny fiskerilicens".

– Sostatt sigur danski teksturin, at skipið ikki kann fáa nýtt veiðiloyvi. Hinvegin nevnir føroyski teksturin bara tað ávísa loyvið, sum skipið hevði.

– Men hetta ósamsvar ímillum føroyska og danska tekstin, hevur kortini ongan týdning í hesum føri, tí Rasmus Effersø fær hvørki nýtt loyvið, sum Snoddið hevði. Talan er heldur ikki um at geva honum eitt nýtt loyvi.Talan er einans um at føra loyvið hjá gamla Rasmus yvir á tann nýggja, sigur Jørgen Niclasen.



*– Skip, sum hava fingið upphøggingarstuðul, kunnu saktans fáa annað veiðiloyvi undir Føroyum. Tey kunnu eisini fáa nýtt veiðiloyvi , sigur lógfrøðingurin hjá Fiskimálastýrinum. Sostatt kann nýggi Tvøratrolarin, Rasmus Effersøe, fara til fiskiskap, nær tað skal vera*

# Fara nú til at togast um nýggjan sáttmála

**Starsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið fara nú undir samráðingarnar um ein nýggjan sáttmála.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Áki Bertholdsen*

Væntandi verður farið undir samráðingarnar ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið um nýggjan sáttmála fyrsta dagin.

Í gjáramorgunin hevði Starvsmannafelagið ikki fingið fundarboð, men Gunnleivur Dalsgarð, formaður, væntaði fundarboð hvørja løtu.

Í øllum førum væntaði hann, at tann fyrsti samráðingarfundurin verður hesa vikuna.

Sáttmálin gongur nnars út 1. mars

Starvsmannafelagið hevur lagt síni krøv fyri Fíggjarmálastýrið, men formaðurin vil ikki almannakunngera tey, fyrrenn partarnir hava havt tann fyrsta fundin, so at tey hava fingið greitt mótpartinum frá krøvunum.

Sáttmálin gongur út 1. mars.

Herfyri segði Gunnleivur Dalsgarð tó við Sosialinum, at, at krøvini eru sett eitt sindur øðrvísi upp í ár, enn vanligt hevur verið.



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, væntar at fáa fundarboð frá Karsten Hansen fyrsta dagin*

Sostatt hevur felagið ikki ásett nakað ávíst prosenttal fyri, hvussu stórt kravið um lønarhækking er.

Harafturímóti hevur felagið kannað lønarlagið, bæði í Føroyum og í øðrum londum, í einum 10 ára skeiði.

– Og tann samanberingin vísir púra greitt, at í øðrum londum eru lønirnar í hesum 10 ára skeiðnum hækkaðar nógv meiri enn hjá okkum, segði Gunnleivur Dalsgarð.

Hann segði, at sjálvandi hevur Starvsmannafelagið sína meting av, hvussu lønirnar skulu vera.

Annars hevur Starvsmannafelagið eisini tiki nógv onnur viðurskifti við í upplegginum til samráðingarnar.

Hann sigur eisini, at fleiri feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum fara at samráðast í felag um ávís mál.

Eitt av hesum málum er eru tey 0,8 prosentini, sum feløgini hava goldið í ein barnsburðargrunn.

–Kemur landsstýrið nú við einum nýggjum barnsburðargrunni, soleiðis, sum tað er fráboðað, er kravið frá feløgunum, at tey 0,8 prosentini verða borðin aftur, áðrenn tosað verður um aðrar lønarhækkingar yvirhøvur.

Somuleiðis vil Starvsmannafelagið hava at vita frá Fíggjarmálastýrinum, á hvørjum støði tað metir, at lønarlagið í Føroyum skal verða í framtíðini.

Annar er lítið at ivast í, at teir komandi mánaðirnir verða sera sera strævnir hjá Starvsmannafelagnum , tí allir sáttmálarnir hjá felagnum ganga út nú, og teir verða nógvir. Umframt at hava sáttmála við Fíggjarmálastýrið, hevur Starvsmannafelagið eisini sáttmála við SEV, Føroya Tele, umframt við fleiri kommunur. Og samráðingarnar við aðrar stovnar, enn Fíggjarmálastýrið, eru so smátt byrjaðar.